# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## HERLIGIR BARNASANGIR

Frískar kular røtur eru nú á gøtuni. Fløga við 10 nýggjum sangum frá Kulum Rótum er komin út, og fløgan bjóðar fittar, stuttligar og fangandi barnasangir. Millum sangararnar eru Jógvan Hansen, Arnfríð Lutzen, Lív Næs, Rógvi Jakobsen, Rakul Ró Steintórsdóttir og Beinir Troest Rasmussen. Leygarkvøldið kunnu Kular Røtur upplivast á 10 ára jubileumskonsert í Runavík.

**Frískar Kular Røtur**
Fløga




## HVONN LIVE AFTUR Á SKRÁNNI

Leygarkvøldið verður Hvonn Live aftur á skránni. Hetta er live-sending, sum Rás2 sendir av Hvonn í Havn. Hesaferð verður millum annað boðið til lívligt politiskt kjak við eitt nú Jørgeni Niclasen, Høgna Hoydal og Helenu Dam á Neystabø. Eisini verður livandi tónleikur, og forvitnisligir gestir støkka inn á gólvið.

**Hvonn Live**
Hvonn/Rás2
Leygarkvøldið 30/10 kl. 20-22




## DOLLIN FELDI LEOPOLD KONG

Daniel Jacob Danielsen, eisini nevndur Dollin, var trúboðari í Congo fyrst í farnu øld. Um tað mundið var Congo stýrt sum persónlig ogn hjá belgiska konginum Leopold II. Har var eitt ræðustýri av teimum ringastu. Dollin hevði ein fingur við í spælinum, tá ið Leopold kongur varð feldur. Óli Jacobsen hevur skrivað bók um ókendu søguna.

**Óli Jacobsen**
Dollin

## LEYP Á SJÓGV

Í sambandi við mentanarstevnuna FaroExpo verður skipað fyri sjósvimjing á Glyvrum sunnudagin. Tiltakið er serliga ætlað teimum, sum vanliga svimja á sjónum, men øll eru vælkomin. Aldur hevur einki at siga, men heilsan má verða góð, serliga er tað fólk við høgum blóðtrýsti og hjartasjúkum sum skulu ansa sær við einum ísakøldum sjokki, siga fyrireikararnir. Øll, ið ynskja eitt brúsubað aftaná svimjingina kunnu nýta brúsurnar hjá kappróðrafelaganum á Glyvrum.

**Sjósvimjarar hittast**
Glyvrar
Sunnudagin 31/10 kl. 14.00

## FIMM FEITAR FLUGUR

Tær fimm damurnar í handverkssamtakinum "Fimm feitar flugur", seldu lutir ymsastaðni um jólini í fjør og nú í sambandi við Mentanarvikuna í Runavík vísa tær fram í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tær fimm feitu flugurnar eru Mikkalina Norðberg við Rabarbuglas, Jórunn Dánialsdóttir, Lív Dam, Erla Matras Jensen og Durita Dam. Tær hava framleitt alt millum himmal og jørð til framsýningina.

**Fimm Feitar Flugur**
Kvinnufelagshúsið á Glyvrum
Friggjdagin 29/10-Leygardagin 30/10





## JÓGVAN & MILLUM FRÆNDUR

Fríggjakvøldið verður konsert í Løkshøll við Millum Frændur og Jógvani Hansen. Steintór Rasmussen er høvuðsmaður í Millum Frændur, og afturat sær hevur hann Rana Nolsøe og aðrar tónleikarar. Hesaferð fer Jógvan Hansen, sum hevur virkað sum tónleikari í Íslandi í nógv ár, at syngja nakrar sangir saman við Millum Frændur eisini.

**Millum Frændur og Jógvan Hansen**
Løkshøll í Runavík
Fríggjakvøldið 29/10 kl. 21.00




## STYRKIS-ROYND

Manchester United hevur fingið ivasama byrjan í Premier League í ár, og Tottenham hongur so dánt í teimum fremstu feløgunum. Leygarkvøldið verður stykisroynd ímillum feløgini. Er United so sterkt, sum felagið plagar at verða, ella kann Tottenham hótta tey allarfremstu?

**Manchester United-Tottenham**
**Premier League**
Leygardagin 30/10 kl. 17.30